## Sjúkrarøktarfrøðingur til Bráðdeildina G1

Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi og avbjóðandi umhvørvi, har grundleggjandi sjúkrarøkt skal samantvinnast við hátøknologi, so er møguleikin her.

Vit søkja eftir tveimum sjúkrarøktarfrøðingum á brøki 0,8 og einum á brøki 0,7 til setan 1. september 2010 ella eftir avtalu.

Bráðdeildin er ein heild við fleiri ymiskum funktiónum, sum umfata intensiva deild, viðrakning, skaðastovu, bráðmóttøku og læknavaktina

Tú kemur, í mun til tørv og førleika, at hava ymiskar arbeiðsuppgávur innan intensiva økið, viðrakning, skaðastovu- og bráðmóttøkuna.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- innleiðslu og upplæring
- fjølbroytt arbeiði og nógvar avbjóðingar
- starvsfelagar við góðum fakligum førleika
- starvsfelagar, ið ynskja at arbeiða í einum mennandi umhvørvi
- ein spennandi arbeiðsdag við góðum møguleika fyri egnari menning
- at arbeiða triðja hvørt vikuskiftið

**Tú hevur:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í viðgerð og røkt av sjúklingum við intensivum og bráðfeingis tørvi
- evni til skjótt at skapa tær yvirlit
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- hug til fakliga menning og avbjóðingar
- góð samstarvsevni og er fleksibul
- eitt opið og jaligt sinni
- møguleika at arbeiða í skiftandi vaktum, dag-, kvøld- og náttarvaktum
- teldukunnleika
- hug og vilja at arbeiða við egnari fakligari menning og førleika
- ábyrgdarkenslu fyri at skapa góðan trivna á deildini

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Nærri fæst at vita við at ringja 304500, lokal 5811 til Jórun Højgaard, deildarleiðara, t-post: lsjorho@ls.fo ella til Astu Joensen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing á Brádeplinum, lok. 5102, t-post: lsastjo@ls.fo

Umsóknarfreistin er
16. august 2010
kl. 12.00

Sjúklingurin í miðdeplinum

Gransking & menning

Størv á Landssjúkrahúsinum



www.ls.fo

## Onnur leys størv (sí meira á www.ls.fo)

**Sjúkrarøktarfrøðingur til A2/Føðideildina**
Umsóknarfreistin er 19. juli 2010

Trivnaður

## Sjúkrarøktarfrøðingur til G3, Medisinsk Ambulatorium

Á G3, diabetes amb. er eitt starv sum avloysari leyst at søkja á starvsbrøki 0,8 til setan 16. august 2010 ella eftir avtalu.

**Arbeiðsuppgávur á diabetes amb. er í høvuðsheitum, at**
- kunna, vegleiða og undirvísa sjúklingum og avvarðandi um diabetes
- undirvísa individuelt og í bólkum
- gera undirvísingarætlanir til sjúklingar
- seta fyribyrgjandi tiltøk í verk
- kunna, vegleiða og undirvísa aðrar deildir um røkt og viðgerð av diabetessjúklingum
- samskipa samstarv við aðrar deildir og primer øki
- samskipa viðgerðir og eftirkanningar hjá diabetes sjúklingum
- hava sjálvstøðugar viðtalur
- geva viðgerðir

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt og fjølbroytt umhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- faklig vitan innan økið
- kliniskar royndir innan røkt og viðgerð á økinum
- góð samstarvsevni, kunna arbeiða tvørfakligt
- arbeiða sjálvstøðugt

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**
- diabetes eftirútbúgving
- drúgvar royndir innan økið

Løn og setanartreytir sambært sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Evu M. Holm, deildarleiðara, tlf. 304500, lokal 6250 ella til Ingun Gaardbo, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, t-post: lsingga@ls.fo

Umsóknarfreistin er 21. juli 2010 kl. 12.00

Sosialurin / KvR 34 18 00

## Varadeildarleiðari til Bráðdeildina G1

Hevur tú hug at vera við til at mynda eina spennandi og avbjóðandi deild, har grundleggjandi sjúkrarøkt skal samantvinnast við hátøknologi, so er møguleikin her.

Vit søkja eftir varadeildarleiðara til G1 á brøki 0,8 til setan 1. september 2010 ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðsøkið umfatar intensivu deild, viðrakning, skaðastovu og bráðmóttøku.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**
- Virkandi leiðari, tá deildarleiðarin er burturstaddur
- Arbeiða í tøttum samstarvi við deildarleiðara í mun til dagliga arbeiðið:
  - starvsfólkaviðurskifti
  - arbeiðslisti
  - fíggjarætlan
- Leggja tilrættis og gera innleiðsluætlan fyri nýsett starvsfólk
- Vera við í klinisku sjúkrarøktini
- Arbeiða í tøttum samstarvi við kliniska sjúkrarøktarserfrøðingin um fakliga menning á deildini
- Ábyrgd av instrumentum og tólum

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur
- áhuga í leiðslu
- áhuga í fakligari menning av starvsfólki
- hollan fakligan førleika innan intensiva økið og viðrakning og/ella bráðmóttøku og skaðastovu
- góð samstarvsevni
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- teldukunnleika

Nærri fæst at vita við at ringja 304500, lokal 5811 til Jórun Højgaard, deildarleiðara, t-post: lsjorho@ls.fo ella til Astu Joensen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing á Brádeplinum, lokal 5102, t-post lsastjo@ls.fo

Umsóknarfreistin er mánadagin 16. august 2010 kl.12.00



Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til: Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn ella við telduposti til umsokn@ls.fo